# Stórur tørvur á kirkju í Hoyvík

**Fríggjadagin varð Hoyvíkar kirkja reist. Í hesum sambandi varð skipað fyri hátíðarhaldi í kirkjuni. Har vóru millum onnur prestar, umboð fyri býráðið, arbeiðsfólk frá Articon og avvarðandi landsstýrismaður**

FÓLKAKIRKJAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Hans Jacob Joensen, bispur, var eisini til hátíðarhaldi. Hann er væl nøgdur við byggingina.

- Tað sær gott út higartil. Eg haldi, at arbeiðið gongur væl. Hetta er ein gomul verkætlan, og vit síggja fram til at fáa kirkjuna lidna. Eftir ætlan skal hon verða klár í september næsta ár, og tað sær út til, at tíðarætlanin fer at halda, metir hann.



*Hans Jacob Joensen, bispur, metir, at tørvur er á einari kirkju í Hoyvík*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hans Jacob metir, at tað er tiltrongt at fáa eina kirkju í Hoyvík.

- Tað er stórur tørvur á einari kirkju. Har búgva um 5000 fólk, og tað bara veksur. Tað er tørvur á hesari kirkjuni, tí at íbúgvatalið í høvuðsstaðnum er so stórt, sigur hann.

Kirkjan verður gjørd eftir gomlum siði.

- Hugskotið er frá tí gomlu føroysku bygdini, har ið kirkjan liggur eitt sindur uttanfyri og myndar bygdina. Tó skal hon liggja væl fyri, so at fólk ikki hava ov langt at fara. Hetta hugskotið er nýtt í nýggjum skapi, sigur Hans Jacob.



*Arbeiðsmenninir hjá Articon eru væl nøgdir við arbeiðið. Tað eru 10-15 fólk frá Articon, sum arbeiða fast í kirkjuni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

NÝGGJ TRYGGING

Viðgerðartrygd

- 24 tíma læknaráðgeving
- Frítt val av privatsjúkrahúsi ella privatklinikk í Skandinavia
- Bíligur og lagaligur flutningur
- Eingin bíðitíð
- Ongar læknaváttanir
- Onki pappírsveldi

Fulnaður:

Viðgerðartrygd veitir 100% fulnað fyri flestu kanningar, viðgerðir og eftirviðgerðir. Til dømis fyri eygnasjúkur, knætrupulleikar, hjartasjúkur, krabbamein og fleiri aðrar sjúkur.

Sethúsatrygd, familjutrygd, vanlukkutrygd, biltrygd, ferðatrygd. Vit geva tær bestu ráðini, finna bestu loysnina, nøkta tín tørv. TRYGD vil vera fremst og setur viðskiftafólk síni í miðdepilin. Við at vera nýhugsandi og bjóða nýggjar tænastur, vísa vit í verki, at TRYGD hugsar um teg.

RING 35 81 00 ELLA VITJA WWW.TRYGD.FO

TRYGD
hugsar um teg.

REPROZ